## Vestas í undanvindi

Danska vindmyllufyritøkan Vestas almannakunngjørdi í gjár eitt sera gott úrslit fyri níggju teir fyrstu mánaðarnar av árinum, og tað hevði við sær, at partabrøvini í fyritøkuni hækkaðu góð 15 prosent í virði. Úrslitið kom ikki óvart á . Men leiðslan í Vestas hevur sett sær stór mál. Sambært Børsen ætlar leiðslan at tíggjufalda umsetningin hetta til 2020, soleiðis at tann árligi umsetningurin verður knappar 400 mia. krónur tá.



## Svart arbeiði hjá Mærsk

Danska skattavaldið hevur illgruna um, at nakrir undirveitarar hjá Lindø-skipasmiðjuni hava arbeitt svart og hava skákað sær undan at rinda meirvirðisgjald. Tí hevur skattavaldið lagt sak ímóti fyritøkuni MT Contractors við kravi um, at fyritøkan skal rinda tí almenna 21,5 mió. krónur. Skat sigur, at MT Contractors leigaði skipasmiðjuni danskar og polskar handverkarar fyri minni løn enn sáttmálalønina. Mærsk eigur Lindø-skipasmiðjuna.

# við skerdum førleika

*Soleiðis fer virkisbygningurin, sum Alv hevur keypt á Kambsdali, at síggja út, tá hann um eitt ár ella so stendur liðugur og klárur at taka í nýtslu*



- Við komandi virkseminum á Kambsdali hava vit nátt flestu økir í landinum, men vit røkka ikki Suðuroynni á hesum sinni. Vit fara at kanna tørvin í Suðuroy nærri og hava síðan ætlanir um at seta virksemið í gongd har seinni.

Virksemið, sum Alv nú leggur lunnar undir á Kambsdali, er sum nevnt ætlað arbeiðstarnaðum fólkum, eitt nú sálar-og sinnisveikum, fólkum, ið eru rørslutarnaði og fólkum, ið hava fingið tillutað hálva ella fulla pensjón.

- Hetta er ein partur av Føroya fólki, ið vanliga ikki eru so sjónlig á arbeiðsmarknaðinum, men sum gjøgnum mennandi tilboð kunnu bjóða fram sína arbeiðsmegi og samstundis gera arbeiðsmarknaðin størri og fjølbroyttari.

### Tørvur á uppvenjing

Tey umleið 25 fólkini, sum fáa arbeiði á Kambsdali, kunnu antin arbeiða heilan ella hálvan dag.

- Vit fara at skipa virksemi við víðum karmum, tí tørvurin hjá hesum fólkum er ymiskur. Tey hava tørv á at vita, at tey eru vird við teimum skerjingum, tey hava, og tey hava eisini brúk fyri at halda sínar førleikar við líka.

Alv sigur, at fleiri av teimum, sum hava skerdan vinnuførleika, hava tørv á eini uppvenjing, og fleiri hava eisini tørv á at verða stuðlaði til at koma í gongd aftur.

- Onkur hevur tørv á at arbeiða einsamallur, onnur í bólki. Neyðugt er at tillaga arbeiðstíðina soleiðis, at til ber at arbeiða eitt nú hálvan dag, sigur sjálvognarstovnurin.

### Tvørfakligur bólkur

Á einum síkum arbeiðsplássi, sum tí, ið karmar nú verða skaptir um á Kambsdali, er neyðugt at skapa so tryggar og góðar karmar sum til ber, og í hesum sambandi er neyðugt at hava ein bólk av starvsfólki, ið er tvørfakligur.

- Vit vita, at tørvurin er stórur á arbeiðsstøðum fyri fólkum, ið eru arbeiðstarnað. Fleiri av umsøkjarunum hjá ALV hava tørv á einum arbeiðsstaði, har tey undir tryggum korum og undir skipaðum viðurskiftum kunnu fáa arbeiðsuppvenjing. Hesin tørvur er serliga stórur hjá sálar- og sinnisveikum fólki, sigur sjálvsognarstovnurin Alv.



*- Fuglafjarðar býráð fer av øllum alvi at gera sítt til, at virksemi hjá Alv á Kambsdali fer at eydnast, sigur býráðslimurin, Dánjal Vang*

## - Hetta er gleðiligt!

**Á tíðindafundi á Kambsdali í vikuni, segði Dánjal Vang, býráðslimur, at Alv hevur góðar møguleikar at menna fólk teoretiskt við Áir og praktiskt á Kambsdali**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Tað er gleðiligt, at tit eru farin undir at gera tann "rúmliga arbeiðsmarknaðin – enn rúmligari".

Soleiðis tók Dánjal Vang, býráðslimur til á tíðindafundi á Kambsdali, nú Alv hevur keypt vinnubygning frá Fuglafjarðar kommunu.

- Eg haldi ikki, at ávís almenn arbeiðspláss hava verið rúmlig mótvegis teimum fólkum, sum hava skerdan arbeiðsførleika.

Hann vísir til frásagnir um tvørrandi forstáilsi fyri hesum fólkum, sum hava verið bornar fram í fjølmiðlunum.

- Vit øtast um óneyðugu og harðrendu framferðina, legði hann aftrat.

Men hóast alt, segði hann, so eru sólskinssøgur, har almenn og privat arbeiðspláss hava fólk við skerdum arbeiðsførleika í arbeiði.

- Í nógvum førum hava partarnir stóra nyttu og gleði av hvørjum øðrum.

Dánjal vísti á, at í Danmark ger IBM eitt stórt arbeiði fyri teirra arbeiðsfólk, sum gerast sjúk.

- Tey gera alt, so viðkomandi, ið gjørdist sjúkur, kann koma aftur í sítt gamla starv, fulla ella niðursetta tíð – ella viðkomandi verður settur at røkja eitt annað starv í fyritøkuni.

Býráðslimurin segði, at tey 25 fólkini, sum koma at arbeiða á Kambsdali, hava eina realkompetansu, sum tey ella onnur ikki hava fingið eyga á.

- Tí er alneyðugt, at ávís fólk gera sær ómak at finna fram dygdirnar hjá hesum fólkum, sum skulu manna hesi arbeiðsplássini.

Hann segði, at eftir at hesi fólk eru ment teoretiskt og praktiskt, er ikki óhugsandi, at tey fara víðari til eitt starv hjá tí almenna ella privata – ella gera sítt egna virki.

- Alv hevur góðar møguleikar at menna fólk teoretiskt við Áir og praktiskt á Kambsdali. Hetta gevur fólki uppaftur betri møguleikar úti á arbeiðsmarknaðinum.

Dánjal Vang segði seg ikki ivast í, at vinnulívið og tað almenna fer at taka væl ímóti hesum nýggju arbeiðsplássum, og at allir partar fara at hjálpa og stuðla hvørjum øðrum.

- Fuglafjarðar býráð fer av øllum alvi at gera sítt til, at hetta fer at eydnast, segði býráðslimurin.